VIÐMERKINGAR

# Fleiri leigutraðir og urtagarðsøkir

**Hans Albert Hansen**
*Hoyvík*
*Valevni sambandsfloksins*
*www.hansalbert.com*



Bíðilistin við fólkum, ið ynskja sær leigutraðir er langur, og hetta má nakað gerast við nú!

Nógvum føroyingum dáma væl at fáast við jarðarbrúk, seyðahald og líknandi. Hesi ítriv, sum eru ein partur av okkara mentan, hava ring kor í høvuðstaðarøkinum, tí útbyggingin av Havnini gevur lítið rúm fyri hesum. Havnar kommuna eigur sum skjótast at finna økir í kommununi, ið kunnu leggjast út sum leigutraðir og smærri urtagarðsøkir, har fólk kunnu hava nakrar gæs og dunnur gangandi ella kanska velta sær nøkur epli. Hetta kann verða eitt andarhol í tí annars so strongda gerandisdegnum hjá fólki umframt eisini eitt kærkomið ítriv hjá eldri fólki. Somuleiðis tryggja vit eina vakra og fjøltáttaða kommunu við nógvum grønum blettum. — Fái eg tína atkvøðu, ert tú eisini komin nærri hesum máli.

# Tað skal verða gott at blíva gamal í Tórshavnar Kommunu

**Høgni Mikkelsen**
*býráðslimir*
*Valevni fyri sambandsflokkin til Tórshavnar Kommunu*



Tað er trupult at blíva gamal í Tórshavnar Kommunu, tí at tørvurin á Ellis- og Røktarheimum er ikki nøktandi.

Trupulleikin er ikki bara hjá teimum gomlu, men sanniliga eisini hjá teimum avvarðandi, tí samfelagið er soleiðis sett saman, at tey eru noydd at arbeiða fyri at fáa dagligdagin at hanga saman, og tískil hava tey hvørki tíð ella orku til tey gomlu og veiku.

Sitandi samgongan, sum eg eri partur av, setti sær fyri, at loysa barnaansingina í kommununi, og sum øllum kunnugt, so er hann loystur við ársenda.

Tað eru tey eldru sum hava lagt nógva orku í, at samfelagið er so gott sum tað er, og tí er tað ein skylda hjá kommununi at tey fáa ein góðan aldurdóm.

Tí vil eg gera mítt til at fáa Ellis- og Røktarheim og stovnar til tey veiku, um eg veri afturvaldur.

# Sunda Kommuna framúr møguleikar

**Heðin Zachariasen**
*valevni*



Tað er sera umráðandi at menna okkara kommunu á ein slíkan hátt, at allir borgarar í øllum bygdunum veruliga fara at merkja, at hóast fleiri kommunur við fleiri bygdum nú verða ein kommuna, so eru vit øll ein eind.

Vit hava eitt til felagsmál, nevniliga at styrkja og menna okkara kommunu.

Komandi Sunda Kommuna verður ein sterk og spennandi kommuna. Eftir mínari meting verða møguleikarnir í framtíðini fleiri og betri. Nýggja felagskommunan fer at gera økið í Sundalagnum meira áhugavert - bæði fyri vinnulívið, mentanarlívið og frítíðarlívið - soleiðis at vit øll, og eisini ungdómurin, kemur at trívast í kommununi nú og í framtíðini.

Tað liggja nærum óendaligir møguleikar í okkara nýggju kommunu, sum liggur væl plaserað, miðskeiðis í landinum.

Tí ræður um hjá okkum øllum at síggja møguleikarnar og virka fyri, at Sunda Kommuna kann vaksa og mennast til besta fyri hvønn einstakan - børn sum vaksin, ungdómar og gomul.

Tað er tí við góðum treysti, eg bjóði meg fram at verða við til at skipa og byggja hesa okkara nýggju felags kommunu okkum øllum at gagni.

# Ein góð kommuna

**Meta C. Palle**



Fyri 25 árum síðani var eg við til at gera eina fotoframsýning í Smiðjuni í Lítluvík við heitinum "Hví so trupult".

Framsýningin skuldi vísa, at tað sum oftast var ógjørligt hjá fólki í koyristóli, og eisini torført hjá illa gongdum fólki at sleppa inn í bygningar í býnum, bæði hjá almennum stovnum og privatum fyritøkum.

Tíbetur er nógv bøtt um hesi viðurskifti síðani tá; men enn eru støð, har trupuleikarnir eru líka stórir sum fyri 25 árum síðani. Eitt dømi er Býarbókasavnið, sum skuldi verið fyri øll, men er tað bara ikki fyri fólk í koyristóli.

Um eg komi í Býráðið, vil eg arbeiða fyri, at tað er atkomuligt hjá øllum til kommunalu stovnarnar.

X við lista C.

# Eldraøkið - lat okkum taka ábyrgd í Tórshavnar kommunu!

**Robert Vilhelmsen**
*Valevni Javnaðarfloksins - listi C*



Eldraøkið varð ikki raðfest av býráðnum og hetta undirstrika tey í har sita so dyggiliga, við m.a. at siga og skriva, at: "nú skal eldraøkið raðfestast".

Sambært "Eldraálitið 2002" er Suðurstreym ein "katastrofa" á eldraøkinum, sambært hesa er minni enn helvtin av tørvinum nøktaður hóast núverandi ætlanir við Tjarnargarð og Vallalíð. Í Eysturoy er støðan øðrvísi, her hava tey megna at fylgja við og um 1 ár er tørvurin nøktaður - ein sonn sólskinssøga á eldraøkinum sum Tórshavnar kommuna kann spegla sær í.

Í mun til fólkatalið er Tórshavnar kommuna vánaligast til at nøkta tørvin á eldraøkinum, ja verri enn t.d. Suðuroy og hetta verður møguliga ein nógv størri avbjóðing fyri kommununa enn barnaansingin hevur verið.

Javnaðarflokkurin er ein ábyrgdarfullur flokkur, sum tekur ábyrgd av eldraøkinum og vil miðvíst arbeiða fyri eini virðiligari loysn, eini loysn, sum røkkur langt fram í tíðina

Tórshavnar kommuna er fíggjarliga sterk og hevur góðar fyritreytir at ganga undan á hesum øki og hevur bestu fyritreytir at taka fulla ábyrgd av eldraøkinum. Hinvegin havi eg ilt við at ímynda mær, at tær smá kommunurnar, við fíggjarligum atliti, hava nakran sum helst møguleika at taka á seg hesa ábyrgd, sum er.

Tískil mæli eg til, at Landsstýrið og kommunurnar fara í samstarv um hesa stóru avbjóðing og at Tórshavnar kommuna gongur undan við eini royndartíð. Við hesum royndum kann støða takast til, um skipanin er nøktandi fyri tey eldru og hvussu hetta fíggjarliga kann skipast millum kommunu og Landsstýrið.

Við tínum stuðli og atkvøðu fer hetta at vera eitt av mínum fremstu málum at fremja í Tórshavnar kommunu.

Tryggleiki og lívsvirði - til allar borgarar!

# Skuldin hjá Tvøroyrar kommunu skal niður

**Finnleif Guttesen**
*býrslimur og valevni*



Eitt mál er at fáa skuldina niður á eina álíkning , tað vil siga frá 74 niður á 43 milliónir eftir fýra árum.

Skuldin hjá kommununi er og hevur verði ein klepp-ur um beinini fyri størri framburði í kommununi. Kommunan rindar nú slakar 10 milliónir í avdrátti og slakar 3 milliónir í rentum um ári.

Kommunan hevur eina bindandi avtalu við lánveitarar í 5 ár, hendan avtalan gongur út við endan av 2005 og skyldar kommunan tá umleið 64 milliónir krónur.

Ein nýggj avtala skal gerast, og haldi eg at eitt mál skal setast, sum sigur, at við árslok 2008 skal kommunan ikki skylda meira enn 43 milliónir krónur.

Við einari líknandi avtalu verður avdrátturin 7 og ikki sum nú, 10 milliónir krónur um ári, frá ár 2006.

Gongur tað gott í framtíðini, og hví skal tað ikki tað, kann kommunan gera størri íløgur ella gjalda skuldina skjótari niður.



VIÐMERKINGAR

# Fyrst og fremst – Ein góð og sterk kommuna fyri øll

**Bjarti Mohr**
*Býráðslimur*



Fólkaflokkurin vil í komandi valskeiði arbeiða fyri at Tórshavnar Kommuna verður eitt vælvirkandi samfelag fyri øll. Vit hava ungdómsarbeiði á skránni bæði innan ítrótt, list, tónleik og mentan í síni heild.

Á sosiala økinum vil Fólkaflokkurin virka fyri at eldraøkið kemur undir kommununa alt sum tað er. Vit hava so at siga loyst barnaansingina og vilja loysa alt arbeiði innan eldrarøkt. Ìøgur skulu gerast sum koma at skapa arbeiðspláss fyri borgarnar í kommununi. Men fortreytin fyri at kommunan skal megna hesar uppgávur er, at vit hava eitt vælvirkandi vinnulív sum kann skapa arbeiðspláss og harvið skattainntøkur. Fólkaflokkurin er meira enn nakrantíð til reiðar at loysa hesar uppgávur. Og hesar uppgávur røkka út um alla kommununa.

Tað er umráðandi at tygum fara á val tann 9 november.

Stuðli okkum í arbeiðinum fyri einari góðari og sterkari Tórshavnar Kommunu við at seta X við lista A - Fólkaflokkin.

# Ítróttur

**Inga Dahl**
*Valevni fyri Fólkaflokkin*



Ítróttarfeløgini í Tórshavnar Kommunu munnu vera tey feløg, sum hava flestar limir í sínum frítíðarvirksemi. Tað trongir saman um í Gundadali, har aktiviteturin er stórur bæði summar og vetur. Í Hoyvík er nýggj ítróttarhøll bygd í hesum seinasta valskeiði, høllin verður eins nógv brúkt, sum hallirnar í Gundadali.

Tað er umráðandi at fáa ítróttarhøllina í Kollafirði liðna sum skjótast, soleiðis at kollfirðingar kunnu íðka ítrótt í heimbygdini. Um dagarnar varð fyrsta stigi tikið til at byggja eina ítróttarhøll á Argjum. Í komandi valskeiði eigur hendan høllin at verða bygd. Tá hendan høllin er liðug, eru karmarnir fyri innandura ítróttinum munandi betri í kommununi.

Svimjihøll og fimleikarhøll verður bygd saman við nýggja skúlanum í Hoyvíkshaganum. Svimjarar hava vit nógvar og góðar í landinum. Men enn eiga vit ongan hyl, sum stendur altjóða mát. Komandi svimjihøll eigur at hava ein 50 metrar langan hyl. At gera ein so mikið langan hyl er kostnaðarmkið, men tað rúmast samstundis fleiri fólk í honum, og tað eru bæði ung sum gomul sum svimja í síni frítíð. Tað er tí onki at ivast í at hetta verður vunnið inn aftur í allar mátar.

Nólsoyingar eru byrjaðir at gera ein svimjihyl í heimbygdini, hesin hylur eigur at vera gjørdur liðugur sum skjótast til gagn fyri nólsoyingar.

# Tí stilli eg upp

**Signar á Brúnni**



Eftir at hava fingið fleiri áheitanir um at stilla upp til kommunuvalið, hava eg sagt ja.

Hetta er fyrstu ferð, eg havi stillað upp til eitt kommunuval, og sjálvandi veit eg ikki hvørja undirtøku eg fái.Til løgtingsvalini, ið eg havi stillað upp til, havi eg altíð fingið dyggan stuðul í Eysturoynni, og ikki minst í Fuglafirði. Hesum havi eg verið sera takksamur fyri, og fari eg her at takka tykkum mongu, ið hava stuðlað meg so dyggiliga, hvørt einasta val, líkasíðani 1970, tá ið eg á fyrsta sinni kom á ting.

### Havi innlit í kommunumál

Hóast eg ikki havi sitið í nøkrum kommunustýri, so haldi eg meg hava innlit í kommunumál.Hetta kemst av, at eg sum landsstýrismaður umsat kommunumál fyri nú nøkrum árum síðani. Ta tíðina, tá harðast leikaði á hjá kommununum, og arbeiðsloysið var stórt sum ongantíð áður, varð neyðugt at seta tiltøk í verk, sum høvdu sum høvuðsmál, at bjarga kommununum úr teimum fíggjarligu trupulleikunum, ið mangir av teimum vóru komnar útí.

Lógin um kommunala lánsgrunnin varð tá samtykt av Føroya Løgtingi, og var tann lóggávan við til at bjarga fleiri kommunum úr neyðini. Við at umsita hetta málsøki í landsstýrinum, fekst gott innlit í kommunumál, og tað saman við tí stóra áhuga fyri kommunmálum, hevur gjørt at eg havi sagt ja til at stilla upp.

### Nøkur høvuðsmál eg havi sett mær.

Tað, sum hevur allarstørsta týdning er, at arbeiði verður til allar hendur í býnum, tí tað er avgerandi, hvat kann gerast av kommunalum arbeiðum. Vit eiga at skapa góðar karmar hjá vinnulívinum at virka undir, uttan at leggja okkum út í, hvussu vinnulívið verður skipað.

Eitt tað týdningarmesta máli hjá einum komandi kommunustýri at loysa, er útvegan av grundstykkjum, til ein rímuligan prís innan eina rímuliga tíð.

Tað hevur týdning fyri býin, at alsamt fleiri fólk búseta seg í Fuglafirði, og tað krevur, at nógv fleiri grundstykkir verða tøk, tí annars er vandi fyri, at tey leita sær aðrastaðni eftir grundstykkjum. Ansast eigur at verða eftir, at grundstykkini verða latin umsøkjarum í teirri raðfesting umsóknirnar koma inn. Vegaføring, vatnveiting o.a. skal verða gjørt, tá ið farið verður undir bygging, og alt skal verða liðugtgjørt so skjótt sum møguligt.

### Barnagarðar

Kommunan skal verða fyrireikað væl og virðiliga til at taka móti teimum, ið ætla sær at seta búgv í Fuglafirði. Prýðiligur barnagarður er bygdur í býnum fyri nú nøkrum árum síðani. Møguleikarnir at bygga út, skuldu verið góðir, so tørvurin verður nøktaður á tí økinum. Hetta skal raðfestast ógvuliga ovarlaga, so vit fara liggja millu fremstu býir í landinum, tá ið talan erum hetta øki.

### Góðan skúla

Skúlin er fyri stuttum bygdur út, og góðar arbeiðsumstøður eru harvið skaptar hjá børnum og lærararun. Ábøtur eiga framhaldandi at verða gjørdar við teir eldru skúla bygningarnar, so teir gerast tíðarhóskandi, og treytirnar í fólkaskúlalógini verða loknar.

Skúlagarðurin eigur at verða gjørdur hugnalgari við størri møguleikum, ið skapar trivna hjá næmingunum.

### Mentamál mugu ikki gloymast

Í fuglafirði hevur, tað eg minnist, altíð verið eitt ríkt, virkið og fjølbroytt mentunarlív. Ìtróttin hevur fingið góðar karmar at virka undir við tí vølli, ið er í bygdini, og tí ítróttarhølli, ið er á Kambsdali. Neyðugt er framhaldandi at byggja út við fótbóltsvøllin, áskoðaraskýli og toalet, m.a. tí at altjóða krøv verða sett til umstøðurnar uttan um vøllin, ið vit ikki sleppa undan, skulu vit taka lut í ítrótti, á sama støði sum grannalond okkara.

Fuglafjarðar Bygdafelag og sjónleikarafelagið tóku stig til at byggja mentanarhúsið, væl stuðlað av landinum og kommununi. Øll ásanna í dag, hvønn stóra týdning tað hevur at hava góðar karmar at virka undir.

Vit eiga framhaldandi at vera býurin, ið gongur á odda, tá ið talan er um mentanarligt virksemi.

### Vakrasti býur

Náttúran um Fuglafjørð er sjáldsama vøkur.Fjøllini um bygdina eru sonn listarverk, ið hvørt fremmanda fólk, ið kemur higar, hevur á orðið.

Sjálvur býurin er nógv fríðkaður tey seinastu árini. Fólk gera alsamt meira fyri at fríðka uttan um hús síni, og kommunan hevur lagt doyin á, at gjørt sítt til, at bygdin gerst vøkur og snotulig. Uppaftur meira eigur at verða gjørt á hesum øki, og størri planlegging yvir eitt longri tíðarskeiðskal gerast, so tilvildin ikki ræður og løtuloysnir verða tiknar, sum sum í seinna enda skapa trupulleikar.Málið skal verða Fuglafjørður vakrasti býur í Føroyum innan 10 ár.

Vit mugu ansa eftir, at eldri vøkur hús, ið falla væl inn í landslagi, og sum siga sína søgu, verða ikki rivin niður uttan fyrilit, heldur eiga vit at leggja doyin á, at varðveita slík hús, um somu tíð sum vit byggja nýggj tíðarhóskandi hús, bæði sethús, virkisbygningar og almennir bygningar, ið fríðka um býin.

Grønar vakrar teigar, saman við vøkrum plantum og trøum, eiga vit at síggja so at siga allastaðni.

### Góð ferðsluviðurskiftir

Ferðslan av bilum gjøgnum bygdina økist í hvørjum,ið kann skapa fleiri vandar fyri fótgangararnar.

Málið um at skapa betri umstøður hjá fótgangarum, serliga hugsað um børnini, eigur at verða tikið upp til viðgerðar, og støða tikin til, hvar vegaforðingar o.a. skal verða gjørt, ið skapar størri trygd.

### Skilagóðan fíggjarpolitikk

Eitt býráð hevur altíð skyldu til at umsita peningin væl, ið borgarnir hava goldið í skatti.

Eitt býráð skal altíð hava í huga, hvussu tað fær mest burtur úr tí peningi, tað umsitur. Tá ið størri arbeiði skulu gerast, eiga tey at verða boðin út, til lægsta prís. Heilt greiðar reglur skulu gerast um hetta.

Greiðar reglur eiga at verða fylgdar, ið siga nágreiniliga, hvussu arbeiðið fer fram millum kommunupolitikkarar og umsiting.

Gott val.

# Kommunan fyri øll

**Jói Winther**
*Valevni hjá Javnaðarflokkinum í Tórshavnar kommunu*



Eg eri tilreiðar, er tú.

Við at seta krossin rætta stað, kanst tú gera tína ávirkan galdandi, so at ábyrgd, trygd og rættvísi vera ein sjálvfylgja, og ikki so tilvildarlig sum nú.

Byggimál mugu kannast áðrenn farið verður í gongd, so vit sleppa av við hesum ábyrgdarloysinum, sum farið er fram hesi seinastu árini. Vit skulu nøkta íbúðartørvin fyri bæði ung og gomul, so byggingin her í komununi gevur møguleikar hjá øllum, at byggja ta stødd og snið av húsum í tørvur er á. Flakavirkið í Nólsoy má fáast í gongd aftur, so at nøkur arbeiðspláss vera á oynni. Í Hesti má gerast tað sum gerast kann, fyri at útróðrarbátarnir kunnu hava tað so høgligt sum gjørligt. Vegurin gjøgnum gomlu bygdina á Velbastað má gerast. Útstykkjast skal í Kollafirði beinanvegin. Kommunan má ikki gloyma tey nýggju økini, men har má gerast alt sum gerast kann, fyri trivnaðin í útjaðaranum. Viljin at gera tað besta er her, tað manglar bert tín krossur valdagin.